## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og regn av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, um kvøldið veksur hann vindin. Regn av og á og hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í ein strúk av landsynningi, týsdagin minni vindur. Regn av og á og hitin millum 10 og 14 stig.

Hóast fríggjadagur er og trettandi:

# Belford byrjar at bora í dag

**Heimsins mest framkoma boriskip Belford Dolphin setur borin í føroysku undirgrundina í dag. Hetta er 4. royndin at finna olju við Føroyar**

**4. BRUNNURIN**
*Jan Müller*

Eftir øllum at døma fer risastóra og eitt av heimsins mest framkomnu boriskipum, »Belford Dolphin« at seta borin í føroysku undirgrundina í dag – fríggjadag 13. juni, tvs. tveir dagar fyrr enn ásett. Ricky Smith er stjóri fyri boringini (Rig Manager) og kemur úr Bretlandi saman við tveimum starvsfeløgum, Robert Doughty, sum stendur fyri fyrisitingini í Føroyum og Campbell Macinnes, ið hevur við útgerð/útbúnað at gera. Harumframt starsvast Unn Joensen á móttøkuni. Felagið hevur leigað høli í Tórsgøtu 16, í hjartanum á Havnini, ikki so langt frá, har italska fyristøðufelagið ENI (Agip) heldur til. Tað er italska fyritøkan ENI (Agip), sum hevur leigað boriskipið Belford Dolphin til boringina.

Ricky Smith ber ikki ótta fyri at byrja boringina ein fríggjadag og tann 13. í mánaðinum. – Skipið kemur á borilokalitiónina í dag og gongst alt væl er klárt at seta borin í í dag. Men tað kann eisini vera, at vit byrja leygardagin. Tað veldst so um umstøðurnar á staðnum sigur Ricky Smith, sum dámar sera væl at skula arbeiða í Føroyum í nakrar mánaðir. Hann er sera fegin um hølini og heldur fólk vera sera fryntligt og fyrikomandi. Eisini eru teir tríggir bretarnir fegnir um at hava kunnað leigað trý sethús frá føroyskum familjum. Felagið ynskir at kunna gera sum mest av arbeiðinum í Føroyum.

Ricy Smith sigur, at teir leggja sera stóran dent á at halda seg til reglur og fyriskipanir, sum eru í Føroyum og her ikki minst umhvørviskrøvini. Tey hava annars eitt av heimsins mest framkomnu boriskipum. Tað var bygt í Korea í 2000 og hevur arbeitt í Brasilia og Miðamerika. Nú er tað so komið longu leiðina úr Brasilia til Føroya. Við skipinum er eisini ein føroysk sjúkrasystur, Anna Maria Simonsen. Hon fer saman við aðrari føroyskari sjúkrasystur at arbeiða umborð, meðan skipið borar í føroyskum sjógvi.

Tey koma helst at hava opið á skrivstovuni í nakrar mánaðir. –Verður talan um eitt lønandi oljufund, hvat vit sjálvandi vóna og vilja gera okkara ítarsta fyri, so verður kanska talan um at vera her longuri sigur Ricky Smith.

Boringin er ætlað at taka umleið tveir mánaðir. Borað verður stutt frá markinum móti Bretlandi. Boridýpdin er 4250 metrar frá skipinum. Hetta er tann 4. brunnurin, sum verður boraður á landgrunninum. Kostnaðurin fyri henda brunnin er nakað minni enn 200 mill. kr. Eini á skrivstovuni hjá Agip í Havn hava tey úr at gera. Eini sjey fólk, serfrøðingar av ymsum slag, eru komin úr Italia og Bretlandi til at taka lut í arbeiðinum.



*Enn ein nýggj býarmynd. Manningin á skrivstovuni hjá borifelagnum Dolphin Drilling í hugnaliga umhvørvinum í Tórsgøtu í Havn, fv. Ricky Smith, Unn Joensen, Robert Doughty og Campbell Macinnes*
*Mynd Jan Müller*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 16 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 20 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 32 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 23 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

**LUFTTRÝSTIÐ**




Eitt lágtrýst, 997 hPa. sunnan fyri Ísland kemur móti Føroyum og hevur regn við sær.




Lágtrýstið við Føroyar fer eystureftir og grynnist, men ein kuldabrúgv norðan fyri Føroyar verður nær Føroyum teir fyrstu dagarnar.

**HITALAGIÐ**




Hitalagið mált frá 11/06 kl. 06[00]– 12/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,5°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

**AVFALLIÐ**




Avfallið: 3,3 mm – mált frá 11/06 kl. 06[00]–12/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 40,1 mm

**VESTFALLSKYRRINDI**

7. juni: Fyrra kvarter
12. juni: Mánin næstur jørðini
14. juni: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. juni | 06.05 | 18.34 | 05.05 | 17.34 | 05.20 | 17.49 | 08.05 | 20.34 | 09.05 | 21.34 | 04.20 | 16.49 |
| 14. juni | 07.04 | 19.34 | 06.04 | 18.34 | 06.19 | 18.49 | 09.04 | 21.34 | 10.04 | 22.34 | 05.19 | 17.49 |
| 15. juni | 08.04 | 20.35 | 07.04 | 19.35 | 07.19 | 19.50 | 10.04 | 22.35 | 11.04 | 23.35 | 06.19 | 18.50 |
| 16. juni | 09.06 | 21.35 | 08.06 | 20.35 | 08.21 | 20.50 | 11.06 | 23.35 | — | 12.06 | 07.21 | 19.50 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. juni | 03.20 | 15.49 | 06.20 | 18.49 | 07.20 | 19.49 | 05.50 | 18.19 | 07.05 | 19.34 |
| 14. juni | 04.19 | 16.49 | 07.19 | 19.49 | 08.19 | 20.49 | 06.49 | 19.19 | 08.04 | 20.34 |
| 15. juni | 05.19 | 17.50 | 08.19 | 20.50 | 09.19 | 21.50 | 07.49 | 20.20 | 09.04 | 21.35 |
| 16. juni | 06.21 | 18.50 | 09.21 | 21.50 | 10.21 | 22.50 | 08.51 | 21.20 | 10.06 | 22.35 |

5 707265 100050 >